# Skála

# Nógvar klemmur eru á Skála

**Skála Ítróttafelag**
**FO-480 Skála**
**www.skalaif.fo**

**STOVNAÐ**
**15.05.1965**

**FORMAÐUR**
**Hans Jákup Andreasen**

**MEISTARAR**
**ongantíð**
**Besta úrslit**
**Nr. 2 í 2005**

**STEYPAVINNARAR**
**ongantíð**

**GREIPUVINNARAR**
**ongantíð**

**Í 1. DEILD (6 ár)**
**2002-**

**Í EUROPA (2)**
**UEFA Cup 2005/06**
**Intertoto 2006/07**

**At fótbólturin er í kappingin við hondbóltin, og at fótbóltsliðið liggur so tætt at grannunum ber við sær, at nýggja nevndin og venjarin standa í stórari avbjóðing**




*Gerandisdagurin er aftur við at koma til Skála, sum ikki kann væntast at verða eins høgtflúgvandi, sum liðið fyrr hevur verið*

Tað er ikki frítt, at tað troyttar á Skála, at teirra fótbóltslið aftur og aftur verður nevnt millum evnini at flyta niður úr Formula deildini. Ta søguna kenna tey væl á Skála. Fyrstu árini í fremstu røð varð liðið roknað sum upplagdur niðurflytari, alt meðan liðið við fínum avrikum spældi seg upp í toppin og fyri trimum árum síðani var so tætt við FM heitið, sum bara EB/Streymur hevur verið uttan at verða meistari. Men á Skála renna tey ikki undan tí sannroynd, at tað er torført og stór avbjóðing at fáa tingini at hanga saman. Fótbólturin er við byrjan og enda á fótbóltsárinum støðugt í kapping við hondbóltin, og sum hjá so mongum øðrum er tað stór avbjóðing at fáa tað fíggjarliga at hanga saman.

Hans Jákup Andreasen hevur verið íðin formaður í fleiri ár. Tað gekk illa at fáa avloysara, og onkra ferðina varð møguleikin nevndur at avtaka felagið, um tað ikki eydnaðist at manna nevndina og at fáa neyðugu inntøkurnar.

Bergur Højgaard er nýggjur formaður, og saman við honum í nevndini eru fleiri, sum ikki áður hava borið ta ábyrgdina. Gamli formaðurin er ikki heilt burtur. Hans Jákup Andreasen er samskipanarleiðari á Skála.

Tað er stutt millum fótbóltsfeløgini í Eysturoy, og tann sannroyndin saman við tí veruleikanum, at úrslitini í fjør ikki vóru so góð, er orsøkin til, at fleiri av teimum, sum seinastu árini hava verið stuðlar, nú eru í øðrum feløgum.

Venjarin, John Petersen, hevur stóra taktiska tilvitan, og hann hevur væl og virðiliga fingurin á føroyska fótbóltspulsinum. Men venjarin kann einki gera einsamallur, og tá ið nógvar skiftingar eru, so er tað alt avgerandi, at stuðulsspælararnir framvegis eru sinnaðir at taka tøk.

Pauli G. Hansen er liðformaður og høvuðsálitið við framúr hugburði. Á Skála halda tey seg hava brúk fyri honum og hinum, sum hava borið liðið upp í toppin. Ein av avbjóðingunum er – umframt at halda Paula, Alexanduri, Boga, Pæturi, Bárði, Arnholdi og hinum til – at seta við. Skála og Strendur eru ikki so fólkaríkt øki, at tað ber til at rokna við, at tað í hvørjum ættarliði eru so nógvir óførir bóltspælarar, sum tað vóru í tí ættarliðnum, sum higartil hevur verið bulurin á liðnum.

Tí er neyðugt við útlendskum styrki, meðan meiri óroyndu spælararnir mennast – eitt nú Petur Pauli Mikkelsen, Jógvan G. Joensen, Eliesar Olsen, Bárður R. Joensen, Teitur R. Joensen, Erland B. Danielsen, Atli Kristiansen, Sjúrður Djurhuus og Markus Olsen - og tað setur aftur eyka krøv til fíggjarligu orkuna. Í ár hjálpa Poul N. Poulsen, Eyðun Madsen og fýra útlendingar til: málverjin Predrag Markovic, veruspælarin Valeriu Mieila og álopsspælararnir Alin Balutoi og Obele Okeke Onyebuchi.

| MÁLVERJAR | Áður spælt við |
|---|---|
| Predrag Markovic | TB |
| Eyðun Madsen | ÍF |
| **VERJA** | |
| Bárður Danielsen | |
| Petur Pauli Mikkelsen | |
| Jógvan G. Joensen | |
| Arnhold Berg | |
| Valeriu Mieila | |
| Eliesar Olsen | |
| Bárður R. Joensen | |
| Teitur R. Joensen | |

| MIÐVØLLUR | Áður spælt við |
|---|---|
| Pætur Dam Jacobsen | AB |
| Erland B. Danielsen | |
| Atli Kristiansen | |
| Poul N. Poulsen | VB/Sumba |
| Alexandur Johansen | |
| Pauli G. Hansen | |
| Sjúrður Djurhuus | |
| Markus Olsen | |
| **ÁLOP** | |
| Alin Balutoi | |
| Bogi Gregersen | |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 |
| John Petersen | B68, GÍ, B36, Leiftur, |
| Skive, Holstebro | |

| TILGONGD | |
|---|---|
| Eyðun Madsen | |
| Alin Balutoiu (Rumenia) | |
| Valeriu Mieila (Rumenia | |
| **FRÁGONGD** | |
| Rúni Rasmussen | (givin) |
| Levi Hanssen | (EB/Streymur) |
| Milic Curcic | (KÍ) |
| Hans Jørgensen - Dk) | (Fremad Amager |
| Debes Danielsen | (ÍF) |
| **VENJARI** | |
| John Petersen | |